

*Jósefs brunnur er aktuellur eftir so væleydnaðan sangleik um kortið hjá Jósefi*

landafrøðingur Mukadesi, markeraði staðið í árinum 985 sum eitt "týdningarmikið stað".

Nógvar sokallaðar gjaldsstøðir, Khanims, sum karavanar við handilsmonnum nýttu, vóru gjørdar tá økið var partur av Osmaniska ríkinum; men hesum støðum, Khan Jib Youseff var týðiliga ikki tørvur á, og Gabriel heldur ikki, at hon bleiv brúkt á handilsrutuni, og metir hann at Khan Jib Youseff er bygt har, tí at brunnurin var har.

Býurin Zefat (Safed) liggur høgt uppi á einum fjalli, og var ein týdningarmikil býur, Zefat var krossfararaborg til ár 1266, mamelukkarnir høvdu Zefat til høvuðsstað í Galilæu og og tann mystiski parturin av jødadóminum, kabbalisman, hevur enn í dag sítt høvuðsæti í Zefat.

Tað tekur 20 min. at koyra frá kibbutz Amiad til Zefat.

Gabriel heldur, at økið niðan fyri Zefat, har Khan Jib Youseff er, bleiv brúkt sum eitt slag av tollstøð, har vegskattur bleiv kravdur og har handilsmenn sluppu av við vøru. Dokument frá Osmannisku yvirvøldini í økinum, ár 1512- umleið 1923, nevna eina herdeild á staðnum, sum búleikaðist í eini bygd tætt við, og bygdafólkinum var eisini álagt at gjalda vegskatt.

Tann fyrsti ferðandi, sum neyvt sigur frá, hvussu brunnurin sær út, eitur Burckhardt, J.L. í ár 1812. Hann er í býnum Zefat har ongin Khan er. Hann fer tíðliga um morgunin úr Zefat, beinleiðis oman av fjallinum móti vatninum ( Genesaret). Hann skrivar, at landið ikki var dyrkað og har vóru ongi trø. Eftir at hava gingið í tveir tímar og eitt korter, kom hann til Khan Jib Youseff Hann skrivar, at gjaldstøðin/herbergið var í ruinum, og ein stórur hylur var við síðuna av. Hann sigur frá søguni um Jósef og lýsir brunnin tætt við herbergið, verandi 3 føtur breiður og 30 føtur djúpur og bygdur av myrkum steinum. Burckhardt skrivar um vatnið, sum ongantíð tømist, og undrar hetta hann, tá hugsað verður um søguna um Jósef, ið varð blakaður í júst sama brunn. Bíblian sigur frá um turran brunn. Hann skrivar, at steinarnir í sjálvum brunninum eru svartir, heyggjarnir, har brunnurin er, eru hvítir av øllum límsteinunum.



*Við síðuna av brunninum eru leivdir frá fornum bústaði og tá farið verður uppá tær sæst beint oman á vakra norðurendan á Genesaret vatninum*

Søgan sigur, at steinarnir blivu svartir av tárunum hjá Jákupi, meðan hann leitaði runt eftir soni sínum. Brunnurin er varðveittur bæði av turkum og av teimum kristnu. Hann nevnir, at fá ferðandi koma har til og at brunnurin er á Akko/Damaskus vegnum, ein lítil bygd er tætt við har soldatar og teirra familjur búgva.

Eg kundi skriva nógv annað sum, Gabriel Kohner segði mær frá, men vil í hesi grein enda við eitt sindur um Via Maris. Via = vegur og Maris = sjógvur.

Via Maris var handilisrutan frá Gaza, til mount Tabor, til Megiddo og síðani til Damaskus. Gabriel heldur, at Khan Jib Youseff var ein Zefat terminalur á Via Maris, tí frá Gaza og til Damaskus eru fleiri slíkir Khanim, tvs. gjaldsstøðir/herberg. Millum hvønn Khan var ein dagur av karavangongd, ið er 6 tímar roknað við ferðini hjá einum kameli, tvs. umleið 36 km. í vanligum lendi og 28 tímar í fjallalendi. Av tí at tað millum allar hinar Khanims á Via Maris eru millum 30 og 28 km, virkar tað løgið, at tað bara eru 4 km frá Khan Jib Youseff og næsta Khan.Tað er hetta, sum fær hann til at halda at, at Khan Jib Youseff endaði sum ein terminalur til Zefat, býurin sum enn í dag, hóast vit koyrdu við bili, er so høgt uppi, at eg næsta ikki tordi at hyggja niður har frá, og tá skilji eg væl, at handilsmennirnir hava roynt at funnið sær eitt hvørt alternativ.

Tá tit eina ferð fara at vitja Jib Youseff (Jósefs brunn ) og Khanin við síðuna av, so skilja tit nokk, at har aldri hevði verið pláss fyri 200-500 kamelum, sum hoyrdi til ein vanligan karavan, og tað tók umleið 20 dagar frá Kairo til Damaskus á kamelbaki.Annars vóru túrarnir eftir Silkivegnum, sum fór langt eystur eftir nógv størri, har vóru vanliga 20.000 kamelar … trúgv tí hvør ið vil.

Men sum tann typiski jødin Gabriel er, flennir hann speiskliga, tá hann tosar við meg sum kristna og sigur: "Leila góða, um vit bæði nú taka Bíbliuna alvorliga, so er brunnurin í Dotan – og ikki her."

Men eg hugsi bara víðari, takki fyri nýpressað appelsinjuice, fari út í ta heitu luftina, hyggi upp í myrka stjørnuhimmalin yvir Galilæu og sigi við meg sjálva, ok, gott nokk siga muslimarnir, at grøvin hjá Jósef er í Nablus (Sikem), har teir hava bygt eina moské, men enn eru tit ikki komin ásamt um, hvar Dotan lá og hví eitur brúgvin longur norðuri enn brunnurin er B´Not Ya'akov, sum merkir "Dóttir Jákups"? Fleiri lokal søgdu mær, at ongin ivi var um, at Jákup og synir hansara hava verið nógv í umráðnum, tit síggja á kortinum.

Á veg heim møtti eg einum gomlum vini, sum eftir at hava hoyrt meg siga frá mínum kvøldi saman við Gabriel Kohner, spurdi: "Leila, veitst tú hvat Jósef hugsaði um niðri í brunninum???"

Í fall onkur lesari hevur fingið hug at vitja vakra og spennandi Galilæa, so ber til at gista á kibbutzum, sum eru alla staðni. Amiad Joseph's Well Country Inn er ein møguleiki. Galilæa er friðarligt, men trygdin er tann sama sum í restini av Ísrael.



*Yvir brunninum er bygdur ein kuppil við 4 súlum*